Kappingareftirlitið

Hansen, Thomassen, Vinther Advokatfirma

Undir Bryggjubakka 21

Postrúm 106

100 Tórshavn

**Att: Djóni Thomassen, adv.**

**Tórshavn 26. september 2017**

Mál. nr. 17/00247

Viðgjørt: R.N.

**Sp/f Jón Thomasen selur stórbilaverkstaðið á Hjalla til P/F Gervi.**

Kappingareftirlitið fekk tann 11. september 2017 fráboðan um, at P/F Faroe Ship og Jón Thomasen høvdu ætlanir um at stovna felagið P/F Gervi, sum eftir ætlan skal keypa stórbilaverkstaðið, sum Sp/f Jón Thomasen rekur á Hjalla 6, 188 Hoyvík.

Talan er um yvirtøku eftir § 13, stk. 1 nr. 2 í kappingarlógini, tí ræðisbroyting fer fram og yvirtøkan kemur undir fráboðanarskylduna í § 16, stk. 1, tí markvirðini í § 14, stk. 1, nr. 1 eru nádd. Sambært ásetingini skal tílík transaktión fráboðast, um tær luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava ein árligan umseting upp á í minsta lagi 75 mió kr. í Føroyum, og minst tvær av lutakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 mio. kr. í Føroyum.

Talan er um eina yvirtøku, sum kemur undir § 3, stk. 3, litra a í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012, og er tí fráboðað eftir einføldum leisti. Við støði í teimum upplýsingum, ið fráboðarin er komin við, metir Kappingareftirlitið, at samanleggingin ikki gevur orsøkir til ivasemi, og hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er treyað av at tær upplýsingar, ið luttakandi fyritøkurnar hava givið kappingarmyndugleikanum eru rættar, sbrt. § 18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson

deildarstjóri

Rúni J. Niclassen

fulltrúi